## DAGSINS MEINING

### Steingið Guantanamo

Atfinningarnar móti USA fyri fangaleguna Guantanamo á Cuba harðna í hvørjum. Ein bólkur av mannarættindaserfrøðingum hevur skrivað frágreiðing, ið hevur sum niðurstøður, at USA má steingja leguna, sleppa øllum fangum leysum ella seta fangarnar fyri dómstólarnar. Støðan, sum nú er, er hvørki løgfrøðiliga ella etiskt haldgóð. Tað sømir seg snøgt sagt ikki einum landi, ið sigst ganga á odda fyri at verja fólkaræðið at uppihalda hesi fangalegu, har menn nú hava sitið í fleiri ár uttan lóg og dóm.

Uttan mun til, um fangarnir hava tikið lut í hernaðarligum atgerðum móti USA ella øðrum vesturlondum, so ber hetta ikki til í longdini. Einki fólkaræði kann uppihalda eini slíkari skipan uttan at taka skaða. Hetta at halda krígsfangar innistongdar í áravís er heilt ósameinligt við fólkaræðiliga siðvenju og kann hetta, um einki hendir fáa sera álvarsamr fylgjur fyri umdømi USA og tess sameindu. Tað er sera umráðandi fyri eitt fólkaræði, at fólkaræðiligar meginreglur verða hildnar í øllum viðurskiftum – at eitt stórveldi ikki hevur eitt sett av reglum fyri seg sjálvt og eitt annað sett, ið er galdandi fyri onnur.

Í stíðnum móti altjóða yvirgangi hava stórveldini tikið alt meira ódemokratisk stig. Hetta hevur reist tann gamla spurningin av nýggjum: Kann eitt demokratiskt land verja fólkaræðið við ódemokratiskum háttaløgum? Tað er júst hetta, sum hendir á Guantanamo. USA, ið sigur seg ganga á odda at verja og menna fólkaræði, hevur framhaldandi hesa fangalegu. Sum eitt framhald av hesum óhepna tiltaki koma nú nýggjar avdúkingar um ræðuleikar í Abu Graib fangahúsinum í Bagdad, ið amerikanska hermegin hevur havt ábyrgdina av. Hesar avdúkingar hava ikki styrkt álitið á amerikanska fólkaræðið. USA og leiðslan har eigur nú at fáa ein enda á hesum óskili, tí hetta er bæði ósømiligt, ólógligt og skaðiligt fyri fólkaræðið ikki bert í USA men um allan heim.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# ES- ella EFTA-limaskapur – hvaðar gongur leiðin?

ANNFINN BREKKSTEIN



**Samgongan hevur sett Visión 2015 á dagsskránna, og Føroyar skulu verða millum fremstu lond í 2015. Men áðrenn tað mugu politikarar taka støðu til ES-limaskap, ella tora at kjakast um tað. Javnaðarflokkurin hevur boðað, frá at EFTA-limaskapur er tann rætti vegurin, meðan Fólkaflokkurin hevur start seg blindan á íslandssáttmálan og vil ikki hoyra talan um nakað.**

Sambandsflokkurin ynskir at taka samráðingar upp við ES, fyri harvið at fáa staðfest fyrimunir og vansar við ES-limaskapi. Men ikki sær út til, at politisk undirtøka er fyri hesum í løtuni.

Tað óskiljandi í hesum er, at Javnaðarflokkurin ikki tekur undir við sjónarmiðunum hjá Sambandsflokkinum, tí tað er nevnliga beint ímóti tí, sum systirflokkarnir hjá Javnaðarflokkinum í norðurlondum gera. Teir eru nevniliga forsprákarar fyri ES-limaskapi.

At Javnaðarflokkurin ynskir, at Føroyar skulu fáa EFTA-limaskap, er at flyta okkum 50 ár aftur í tíðina og ein óskiljandi útmelding. Hetta, tí EFTA skjótt kann gerast ein amputeraður felagskapur, um Noreg og Ísland gerast limir í ES. Hesin spádómur sær eisini út til at halda, tí íslendskur toppolitikari hevur um dagarnir meldað klárt út, at hann heldur at Ísland eigur at gerast limir í ES.

Sambandsflokkurin vil framvegis arbeiða fyri betraðum marknaðarviðurskiftum fyri okkara vinnulív. Hetta náða vit bert við at kanna fyrimunir og vansar við ES-limaskapi, tí ES er okkara størsti og gagnligasti marknaður.

Skulu vit røkka teimum málum, ið sett eru fyri Visión 2015, mugu vit tora at taka avgerðir, sum koma at broyta okkara samfelag. Harvið er ikki sagt, at tað verður til tað verra, men eitt ørvísi samfelag kann eisini merkja eitt betri samfelag fyri øll, hægri livifótur, hægri pensiónir o.s.fr.

Eg eri púra samdur við sambandstingsmanninum Jóhan Dahl, tá hann sigur, at tíðin er komin, at politikarar mugu finna eina loysn, har vit verða limir í ES – ongantíð ov skjótt.

Tað er ein sannroynd, at ES-limaskapur hevur eitt ótal av møguleikum við sær, sum kunnu styrkja okkara oyggjasamfelag. Vit skulu tora at ganga nýggjar leiðir, og tora at lata hurðarnar upp fyri útheiminum, tí tá verða hurðarnir latnar upp fyri okkum úti í heimi. Ikki fyrr enn tá er Visión 2015 veruliga í eygsjón.

Taka vit ikki støðu til ES-limaskapin, er vandi fyri, at Føroyar koma at liggja avbyrgdar úti í Norðuratlandshavinum og av Visión 2015 kann gerast ein marra fyri okkum.

# Halt uppat við at niðurgera okkum, Kjartan!

**Viðmerking til Kjartan Joensen um vegaføringina um Leirvík**

POUL ANDRIAS JOENSEN

Bleiv ikki sørt skakkur at hoyra Kjartan Joensen í útvarpinum í morgun, har hann av tingsins røðarapalli, kallar ynski hjá uml. 90% av leirvíkingum fyri ein luksustrupulleika.

Leirvíkingar hava ongan luksustrupulleika, men bert eitt sakligt krav um, at vegaføringin frá Norðoyatunlinum ikki verður løgd ígjøgnum okkara besta byggilendi.

Fáa Vinnumálaráðið og Landsverk sín vilja, leggja teir ein landsveg ígjøgnum okkara besta byggilendi, og vit missa eini 120 grundstykkir, sum svarar til umleið 20% av eftirverandi byggilendinum, umframt at bygdin verður deild í tvey – hetta koma vit ongantíð at góðtaka!!

At Kjartan Joensen ikki er samdur við fjøldini í Leirvík, hevur hann sín fulla rætt til, men vælsignaði maður halt uppat við at niðurgera okkum.



Altíð tað nýggjasta

www. sosialurin.fo

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.